# B71 úr 2. deild

B71 hevur heitt á Kappingarnevndina um at fáa loyvi at taka næst besta lið sítt úr kappingini í 2. deild. Hesum hevur nevndin heimilað, vísandi til grein 12 í kappingarreglunum, og verða allir dystir móti B71 og øll mál, sum eru skrásett í hesum dystum, strikað, skrivar FSF á heimasíðu síni.




# Messi bestur hjá UEFA

Lionel Messi hjá Barcelona varð í gjárkvøldið heiðraður sum besti spælarin í Europa. Talan var um atkvøðugreiðslu, sum UEFA skipar fyri, og varð heiðurin lætin, tá lutakast var til bólkaspælið í Champions League í gjár. 22 ára gamli Messi var ein av mest týðandi spælarunum hjá Barcelona, sum vann bæði lands- og steypakapping í Spania umframt Champions League. Til samans stóð hann fyri 38 málum fyri Barcelona seinasta kappingarár, og tað er eingin ivi um, at hann er ein av stórfavorittunum til gylta bóltin, sum France Football letur seinni í ár.

07 Vestur-B36:

# Brak í Sørvági



**Tað er veruliga lagt upp til botnbrak í Sørvági, har 07 Vestur av álvara er um at kveikja lív í vónina um framhaldandi tilveru í Vodafone-deildini**




Jákup Mørk

Við seks dystum eftir er 07 Vestur framvegis á botnsessinum í Vodafone-deildini. Ein sessur, sum vágaliðið hevur sitið á størsta partin av kappingarárinum.

Seinastu vikurnar hava tó av álvara kveikt vónina um, at 07 Vestur kann vinna seg upp um niðurflytingarstrikuna, áðrenn 27. og seinasta umfarið er av. Og ikki minst var talan um imponerandi sigur, tá teir seinasta sunnudag vunnu á útivølli móti Víkingi. Og verður talan aftur um trý stig, nú B36 vitjar, er bjargingin bara trý stig burturi.

Og tað verður eitt mest sum fullmannað lið, sum fer á vøllin. Einasta ivamálið er Hendrik Rubeksen, sum beklaði í vikuni, og tí neyvan er til reiðar at spæla, verður sagt úr Sørvági.

Hjá B36 iðra tey seg framvegis um, at tað ikki eydnaðist at fáa stig burtur úr dystinum móti EB/Streymi mikukvøldið, men leikliga avrikið var tó at slíkum slag, at tað gevur vónir um fleiri stig.

Hesa ferð er einasta ivamálið Jákup á Borg, sum kendi nakað av eymleika í lærinum mikukvøldið, og tí ikki vandi í gjár. Men tað verður tó roknað sum sannlíkt, at hann er partur av hópinum, tá sunnudagin fer á vøllin til ein dyst, sum frá fleiri síðum verður mettur sum tann týdningarmesti hjá B36, síðani teir á seinasta leikdegi í 2005 vunnu FM-heitið í dysti móti HB.

**Tað eru bara fýra ár síðani, at B36 seinast vann FM-heitið. Men í dag er alt tos um gull og annað skreyt skift út við ítøkiligan niðurflytingarvanda**



HB-Víkingur:

# Gullroykur í Gundadali

**Enn er gullið ikki komið í hús, men hvørt stig, sum HB vinnur, førir liðið nærri gullinum. Hesa ferð vitja víkingarnir, sum ikki eru heilt so ræðandi, sum teir hava verið fyrr í ár**




Jákup Mørk

Tað er eingin, sum tykist steðga HB. Gaman í taptu teir fyri hálvari aðru viku síðani heimadyst móti EB/Streymi, men gullið kemur kortini nærri fyri hvørt umfarið, sum gongur.

**Víkingur vann Løgmanssteypið við millum annað at senda HB úr kappingini. Men í landskappingini hevur tað tó riggað betur hjá HB, sum er greitt á odda í Vodafone-deildini**

Við 10 stigum at geva av til næsta liðið eru heldur ikki nógv, sum tora at seta pening uppá, at HB ikki verður meistari, men í norðara húsinum í Gundadali vilja tey á ongan hátt kanna sær bitan.

- Tað sær sjálvandi gott út, men nú hugsa vit um Víking, eru boðini frá Sámali Erik Hentze, venjara, ið tykist væl ávegis at røkka málinum um, at hann framvegis skuldi vera venjari, tá HB í oktober mánaði hevur ársveitslu.

Ein av uppskriftunum í góðu gongdini hevur verið ein sera støðugur verjupartur, har skiftingarnar ikki hava verið serliga nógvar. Men tað verður tó neyðugt við broytingum hesaferð.

Rasmus Nolsøe er farin av landinum í lestrarørindum, og enn er Vagnur Mohr Mortensen ikki komin fyri seg, og tí verður neyðugt við nýggjum fólki ella umskipan á liðnum.

Í aðrar mátar er HB tó væl fyri. Einki leikbann rakar hópin í løtuni, og sæð burtur frá Vagni Mohr Mortensen er eingin maður á skaðalistanum.

Hjá Víkingi hevur formkurvan ikki verið heilt so góð seinastu vikurnar. Steypasigurin tykist so ella so at hava skapt nøgdsemi í hópinum, og bæði móti ÍF og 07 Vesturi hevur talan verið um óvæntað tap á heimavøllinum í Sarpugerði.

- Vit hava kanska verið eitt sindur sløvir í seinastuni, og hasi bæði úrslitini hava ikki verið nóg góð. Eg veit ikki, um tú kanst siga, at vit hava mist nakað av villskapinum, men tað má so broytast, um vit skulu hava nakað við okkum úr Gundadali móti HB, sigur Súni Olsen, sum uttan iva verður á sentrala miðvøllinum.

Heldur ikki Víkingur hevur nøkur leikbann. Hinvegin noyddist Sølvi Vatnhamar av vøllinum við skaða í tapinum móti 07 Vesturi, og hann verður neyvan tøkur. Tað verður Sam Jacobsen neyvan heldur, hóast hann nú spakuliga er byrjaður at venja eftir skaðasteðg.